


Tey, sum eru áhugað at starvast sum ráðgevar, eru vælkomin at venda sær til Onnu Elisabeth Iversen á tlf. 582 555 ella Alice Simonsen (Tlf. 519248), ella við at skriva til barnabati@email.fo. Ráðgevingin heldur til mitt í høvuðsstaðnum og fer væntandi at hava opið tríggjar dagar um vikuna. Fólk, sum hava áhuga í ráðgevingararbeiðnum, men sum ikki hava møguleika at taka vaktir, tí at tey búgva langt frá høvuðsstaðarøkinum, eru eisini vælkomin at venda sær til fyrireikararnar, um tey hava hug at vera brævkassaráðgevar.




**Í arbeiðsbólkinum eru:**
Annlis Bjarkhamar, samskipari
Guðrun Hammer, samskipari
Anna Elisabeth Iversen, sálarfrøðingur
Alice Simonsen, námsfrøðingur
Guðrið Petersen, lærari

lærarar ella læraralesandi hava áhuga í at starvast sum sjálvbodnir ráðgevar.

Starvið sum ráðgevi inniber, at ein hevur møguleika til at taka umleið tvær vaktir um mánaðin; tær fara at vara umleið 5 tímar hvør. Uppgávan krevur, at ein hevur hug at lurta eftir og tosa við børn og ung um trupulleikar av alskyns slagi. Tey, sum koma at arbeiða sum ráðgevar, vera í fyrsta umfari ikki lønt, men sleppa at taka lut ókeypis á viðkomandi skeiðum. Skeið í ráðgeving verður eisini áðrenn byrjan. Harumframt gevur starvið møguleika at menna eins samskiftisførleikar og ikki minst at hjálpa børnum og ungum, sum veruliga hava brúk fyri at tosa við onkran.

## Undirvísingartilfar

Tá ið arbeitt verður við at bøta um umstøðurnar og tryggja grundleggjandi rættindi hjá børnum og ungum, ber til at arbeiða á nógvum ymiskum økjum. Umframt at seta á stovn eina barna- og ungdómsráðgeving, hevur verkætlanin „Tú hevur rætt“ til endamáls at gera børn og ung tilvitað um, hvønn rætt tey hava í samfelagnum, og styrkja tey í at krevja sín rætt. Hetta verður gjørt við at veita øllum føroyskum fólkaskúlanæmingum undirvísingartilfar um hetta evnið. Arbeiðsbólkurin aftan fyri verkætlanina hevur samstarvað við Bókadeild Føroya Lærarafelags um at fáa hetta tilfarið gjørt, og ein umfatandi læraravegleiðing fylgir við tilfarinum. Tilfarið fer út í allar føroyskar skúlar í januar mánaði.

## eg.fo

Barna- og ungdómsportalurin eg.fo er miðdepilin í verkætlanini „Tú hevur rætt“. Umframt at børn og ung kunnu fáa samband við ráðgevingina umvegis henda portal, so hevur portalurin eina rúgvu av upplýsandi tilfari um evni, sum eru viðkomandi fyri tey ungu, til dømis um happing, einsemi, hjúnaskilnað, kynslív og so framvegis. Eisini fer portalurin at upplýsa um tiltøk fyri ung, og at varpa ljós á ymisk evni, sum tey ungu hava áhuga í. Portalurin verður eisini klárur um sama mundið, sum ráðgevingin letur upp, og undirvísingartilfarið fer út í skúlarnar.